# Gongur framá hjá Jón Róa



**Tað gongur spakuliga, men støðugt fram á við venjingini hjá Jón Róa Jacobsen. Hann roknar við at verða klárur at venja við fullari ferð í mai mánaði**

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*

Jón Rói Jacobsen fekk í fjørheyst álvarsaman skaða, tá ið hann sleit eitt krossband í knænum undir venjing í Brøndby.

Hesir skaðar eru ikki heilt ókendir í fótbóltsheiminum, og hóast viðgerðin og venjingin aftan á skaðan tekur langa tíð, so koma spælarar vanliga fyri seg aftur.

Og soleiðis verður eisini hjá Jón Róa.

Hann hevur seinastu mánaðirnar fingið viðgerð og vant við vektum, og nú er hann eisini farin at renna.

– Tað gongur júst sum ætlað hjá mær. Eg eri farin at renna aftur, og tað gongur fínt. Nú kann eg fara at hugsa um at gera onkrar léttar tekniskar venjingar við bólti, sigur hann.

Um hálvan apríl kann hann fara at venja meira við bólti, og so roknar hann við, at hann einaferð í mai mánaði kann venja við fullari ferð aftur.

## Finna sær nýtt felag

Jón Rói hevði sáttmála við Brøndby, tá ið hann fekk skaðan, men sáttmálin gekk út á nýggjárinum. Brøndby hevur tó stuðlað Jón Róa, nú hann stríðist við at koma fyri seg aftur. Jón Rói venur í Brøndby, og har fær hann alla hjálp, sum felagið kann veita honum.

Tað er tó greitt, at tá ið Jón Rói verður frískur aftur, fer hann at finna sær eitt nýtt felag at spæla fyri, og hann ætlar sær ikki heimaftur til Føroya.

– Enn havi eg onga avtalu gjørt við nakað felag, men eg fari at royna at finna mær eitt nýtt felag í Danmark at spæla fyri. Í løtuni taki eg tað róligt og hugsi fyrst og fremst um at koma fyri meg aftur, sigur hann.

Í landsliðshøpi hevur hann sett sær sum mál, at hann skal verða klárur at spæla fyri landsliðið aftur, tá ið Føroyar í summar fara at spæla ímóti Hollandi.

# Nygaard í Seriu B

**Hálvi tvørámaðurin Marc Nygaard, sum hevur fingið nakrar dystir á danska landsliðnum, hevur síðani skiftið frá hollendskum til italskan fótbólt verið á heili fýra liðum, og nú roynir stóri danin seg í Seria B felagnum Vicenza**



*Hálvi tvørámaðurin spælir nú í Italia*

**Heini í Skorini**
*heini@sosialurin.fo*

Hálvi føroyingurin Marc Nygaard fekk veruliga gjøgnumbrot í karrieru síni við Roda JC í Hollandi, og hann var eitt skifti í danska landsliðshitanum. Men síðani hann tók av møguleikanum at royna seg í italskum fótbólti, hevur hann als ikki megnað at sligið til.

Royndir Nygaards í italskum fótbólti byrjaðu í Seria A í Perugia, har hann eftir royndarvenjing ikki fekk sáttmála.

Síðani gekk leiðin til Brescia, har hann fekk sáttmála, men eftir eitt stutt uppihald á beinkinum varð hann sendur til Catania í næstbestu deildini.

Nygaard fekk eina góða byrjan í Catania í álopinum saman við roynda Seria A áleyparanum Luis Oliveira, men tá Catania keypti nýggjar áleyparar, varð Nygaard aftur settur á beinkin, og so sló Vicenza til og keypti høga og myrka danan, sum tykist hava fingið meiri royndir í flogførum, tokum og bussum enn á grasvøllinum í Italia.

Uttan stórvegis success higartil roynir Nygaard nú at sleppa á lið í Vicenza, sum ikki hevur tað lætt í italsku serie B.

# Claus Bech Jørgensen í andróðri

**Hálvi føroyingurin í enskum fótbólti, Claus Bech Jørgensen, hevur verið í andróðri í nýggja felagi sínum Coventry, sum hann skiftið til við kappingarársbyrjan í august 2003, og hann er nú leigaður aftur til gamla felag sítt í 2. deild, Bournemouth**

**Heini í Skorini**
*heini@sosialurin.fo*

27 ára gamli danski fótbóltsleikarin úr Holstebro í Danmark, Claus Bech Jørgensen, hevur enn ikki spælt ein landsdyst á danska landsliðnum, og tískil er møguleikin enn til staðar, at yrkisleikarin í Onglandi avgerð at luttaka á føroyska landsliðnum.

Fyrrverandi Horsens leikarin hevur tó ikki funnið seg heilt til rættis í Onglandi, síðani hann í 1999 gjørdist ársins leikari í Bournemouth.

## Mótvindur í Coventry

Síðani stórtíðina í Bournemouth í 2. deild hevur hann verið í Bradford í 1. deild, men tá sáttmálaskeið hansara varð runnið, skifti hann við kappingarbyrjan í august 2003 til Coventry undir táverandi venjaranum Gary McAllister, sum tey flestu kenna frá skotska landsliðnum.

Men higartil størsta avbjóðing hansara í Coventry hevur ikki gingið til vildar, millum annað av einum knæskaða, og hann er bert komin inn í fýra dystum.

## Gamlar gøtur

Í mótgongd hansara var leiðslan í Bournemouth skjót at leigað sær gomlu hetjuna, og í løtuni verður hann leigaður ein mánaða í senn.

Síðani afturkomuna til Bournemouth hevur hann spælt átta dystir og er á veg uppeftir. Ógreitt er, nær hálvi føroyingurin fer aftur til Coventry, og somuleiðis er heldur ikki greitt, um hann hevur slept dreyminum um danska landsliðið og í staðin vil stilla upp fyri føroyingar.

Kanska skuldi Henrik Larsen sligið uppá tráin…



*Eftir mótgongd í Coventry í 1. deild er hálvi føroyingurin Claus Bech Jørgensen aftur í gamla felagnum Bournemouth í 2. deild. Enn hevur hann ikki víst føroyska lansdsliðnum áhuga orsakað av dreyminum um danska landsliðið*



